# Trøllafløga og litbók



*Nú er ein nýggj fløga komin á marknaðin við nýggjum og kendum løgum frá Trølla-Pætur, Ommuni og øllum hinum, sum spældu við í seinasta filminum*

**Í vikuni kom nýggj føroysk fløga og litbók á marknaðin. Tað er felagið IRIS sum stendur aftan fyri hesi spennandi og annaðleiðis útgávuni**

TÍÐINDASKRIV
*Iris*

Á fløguni sum hevur fingið heitið "Í føðingardag hjá Trølla Pætur" er ein fitt barnasøga og 10 sangir. Teir flestu av sangunum eru nýggir, men onkur frá filminum er eisini við. Eitt nú "Trøllini og Mafian" og "Eg eiti Jógvan".

Søgan og sangirnir eru knýttir saman á ein stuttligan hátt, og sangirnir binda søguna saman. Søgan er eitt ljóðspæl, har man umfraamt tann sum greiðir frá, eisini hoyrir persónarnar, sum leika við. Høvuðspersónarnir í søguni eru Trølla Pætur, Trølla Omman, Jógvan Yvirpolitimeistari, Erling Politistur, Leikamafian við Stampi, Anthonio og Willy, Kári Handilsmaður og Ossi.

Í stuttum kann man siga um søguna, at Trølla Pætur gleðir seg at halda føðingardagin. Umfraamt Jógvan og Erling, so hevur hann eisini boðið øllum sínum floksfeløgum og vinum heim til sín henda dagin.

Sama dag sum Trølla Pætur hevur føðingadag, verður Leikamafian leyslatin. Teir hava nú sitið sín dóm og eru nú fríir menn. Men teir hava ikki lært nakað av at hava sitið í fongsli í eitt ár - teir leggja beinanvegin nýggjar ætlanir at stjala, og tá teir avgera at stjala allar pengarnir frá Ossa, sum er á veg í føðingardag hjá Trølla Pæturi, tá kann tað bara enda galið. Ossi við Leikamafiuni enda í Føroyum, so er spurningurin, um Jógvan og Erling politistar megna at fanga Leikamafiuna, áðrenn hon ger nakran skaða.

Við fløguni fylgir eisini ein litbók við. Í litbókini kann man leggja litir á allar persónarnir, sum eru við í søguni, umfraamt aðrar tekningar. Litbókin er 40 síðir og kann man eisini keypa hana uttan at keypa fløguna.

Stuðlað útgávuni hava: Føroya Shell, BR-Leikur, Kall, J.F.Kjølbro Heilsøla, Poul Michelsen og Skipafelagið Føroyar. Fløgan og litbókin fáast um alt landið.

# Einaferð var tað

**Once upon a time er heiti á einum risastórum tiltaki, sum verður hildið í Parkini í Keypmannahavn í apríl mánaði komandi ár í sambandi við, at H. C Andersen hevði fylt 200 ár. Flogfelag Føroya skipar fyri ferðum, har atgongumerki til sjálvt tiltakið eru íroknað**

H.C.ANDERSEN
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Fyrsta vikuskiftið í apríl mánaði komandi ár, verður eitt stórsligið tiltak í Parkini í Keypmannahavn fyri at hátíðarhalda 200 ára dagin hjá H.C.Andersen. Ein stór hátíðarveitsla við framsýningum av ymsum slagi verður hildin í Parkini alt vikuskiftið.

Tann heilt stóri dagurin verður leygardagurin 2. apríl, har kongeligir, altjóða gestir, H.C. Andersen ambassadørar umfraamt 40.000 áskoðarar savnast til tað stóra tiltakið, sum hevur fingið heitið "Once upon a time".

Meira enn 300 listafólk av ymsum slagi fara at upptraðka. Dansarar, tónleikarar frá bæði popheiminum og tí meira klassiska og onnur hittast í einum ævintýrakendum showi, sum heiðrar hugtakandi hugaheimin hjá H.C.Andersen.

H.C.Andernsen er kendur um allan heimin, og tískil skal hetta tiltakið vera á einum altjóða støði, har størstu stjørnurnar av ymsum slagi í heiminum verða umboðaðar. Arbeitt verður við at fáa navn sett á stjørnurnar. Higartil hevur eydnast teimum at fáa so fræg fólk sum: Nigel Kennedy, (UK), Cui Jian, (Kina), Den kgl. Ballet (DK), Harry Bellafonter, (US) Susan Sarandon (US), Isabel Allende(Chile) og mong, mong onnur.

Ævintýrini hjá H.C. Andersen eru sjálvandi eisini vælkend í Føroyum. Hvørt mansbarn men kenna ævintýrið um eitt nú "Tann ljóta dunnuungan". Tískil hevur Flogfelag Føroya tikið stig til at skipa fyri ferð niður til tiltakið. Meiri fæst at vita um ferðirnar á heimasíðuni hjá Flogfelagnum: www.ff.fo ella við at venda sær til Flogfelagið.

# Útgávudagur í Klaksvík




Í kvøld, týskvøldið, verður bókin um vinnulívsmannin og rokskiparan Kaj Johannesen løgd fram í býráðshøllini í Klaksvík

Skráin verður fjølbroytt. Kvinnukórið Suð fer at syngja, varaborgarstjórin Torleif Sigurðsson bjóðar vælkomin, formaðurin í Mentanarnevndini Jórun Høgnesen heldur røðu, leiðarin av Fornminnasavninum Jógvan Ravnsfjall greiðir frá um bókina og fyrsta eintakið av bókini verður handað varaborgarstjóranum, Torleifi Sigurðsson.

Rithøvundurin Jústinus Leivsson Eidesgaard kemur eisini at greiða frá um forarbeiðið og útgávuna

Eftir framløguna fæst bókin til keyps í Kunningarstovuni, har rithøvundurin - Jústinus Leivsson Eidesgaard eisini signerar bókina.

Framløgan verður sum sagt í Býráðshøllini týskvøldið og byrjar klokkan 19.

**- sae -**

HALDIÐ SOSIALIN
**450,-** um ársfjórðingin
- sparið **395,-** í mun til leysasølu
600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)
Sosialurin
ARGJAVEGUR 26 · POSTSMOGA 76 · 110-TÓRSHAVN · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW.SOSIALURIN.FO

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Ókeypis
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Navn:
Bústaður:
Postnr.:
Bygd/býur:
Telefon nr.:
Undirskrift:

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

um...
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
...er lisin
-so ert tú við!

Lesið Sosialin

# Meirilutin ikki fundast enn

**Klaksvík:** Tað hevur gingið serstakliga striltið hjá nýggja meirilutanum í Klaksvíkar býráð at fingið ein fund um at gera arbeiðsætlanir og at manna tær ymsu nevndirnar frá hondini. Einar tríggjar ferðir er fundurin fluttur vegna forfall av ymsum slagi.

Nú er so borgarstjórin Steinbjørn Jacobsen farin til Danmarkar og verður burtur alla hesa vikuna. So nýggur fundur er ikki avtalaður fyrr enn í aðru viku.

— Ja, vit hava havt ótrúliga torført við at savna tropparnar, men vit hava sum so ikki so nógvan skund enn, sigur Jákup Mikkelsen, nývaldur býráðslimur hjá Fólkaflokkinum.

Hann sigur, at nevndirnar eru so gott sum mannaðar, men avgjørt er ikki at fara út við tí, fyrr enn arbeiðsætlanin fyri komandi fýra árini er gjørd.

**- sae -**



# 350 fingu fótin av flyting til Føroya

**Stjórin í norska reiðarínum Fjordline gav mánadagin 350 fólkum sekkin, tí Fjordline flaggar út til Føroya. Starvsfólkini vóru í øðini um uppsagnirnar**

UPPSAGNIR
*Eyðun Klakstein*

Fyrrpartin mánadagin fór stjórin í norska reiðarínum Fjordline, Ove Johan Solem, á fund við síni starvsfólk og boðaði frá, at 350 av 500 fólkum verða søgd úr starvi.

Orsøkin er, at norska reiðaríið fer at skráseta seg í føroysku skipaskrásetingini fyri at spara lønarútreiðslur, og tí má meginparturin av starvsfólkunum úr sínum størvum í mars ella apríl mánaði næsta ár.

Ein serliga norsk skattaskipan fyri sjófólk verður avtikin frá 2006, og tað hevur fingið Fjordline til at leita til Føroya.

### Harðar atfinningar

Norska blaðið VG skrivar, at Ove Johan Solem fekk av at vita frá sínum starvsfólkum, eftir at hann hevði boðað frá hópuppsøgnunum.

Tað vóru ógvulisligar reaktiónir frá starvsfólkunum, sum ivaðust í, hví Fjordline skal flagg út beinanveg, tá ið norska skattaskipanin varðar til 2006.

Fjordline missir 60 milliónir krónur, tá serliga skattaskipanin fer úr gildi, og hetta brúkar leiðslan í felagnum sum grundgeving fyri at skráseta seg í føroysku FAS-skipanini.

Starvsfólkini mótmæltu í gjár uppsagnunum.

# Guðrun bjóðar smakkiroyndir

**Í januar mánaði gevur føroyska songkvinnan Guðrun Sólja Jacobsen sína næstu fløgu út í Danmark. Men longu nú ber til at hoyra brot burtur úr sangunum, sum eru at finna á nýggju fløguni**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Á heimasíðuni hjá Guðrun Sólju Jacobsen ber til at taka partar av tónleikinum niður á telduna fyri at fáa eina hóming av, hvussu nýggja fløgan fer at ljóða.

Fløgan er framleidd av Poul Halberg og Stig Kreutzfeldt, sum báðir eru kendir menn í donskum tónleiki, og sum báðir eru kendir fyri at framleiða bleytan og melodiøsan popptónleik.

### Kendir sangir

Nýggja útgávan hjá Guðrun kallast Wake Up, og á fløguni eru fyrst og fremst sangir, sum eru kendir frammanundan, men



*Guðrun Sólja Jacobsen skal geva nýggja fløgu út í Danmark, og hon skal vera við í nýggjari songkapping hjá DR*

sum Guðrun hevur gjørt sína egnu útgávu av. Til dømis Imagine hjá John Lennon og Every Breath You Take hjá Police.

Áðrenn sjálv fløgan kemur út, verður ein stakfløgu sett til sølu, og hesi stakfløgu verður ein nýggjur sangur, sum Poul Halberg hevur skrivað. Sangurin, sum kallast Call For You, hevur potentiali at gerast hitt, og tað ber til at hoyra brot úr honum á heimasíðuni hjá Guðrun Sólju Jacobsen.

Nýggja fløgan kemur út 31. januar, men smakkiroyndirnar finnast á www.gudrun-jacobsen.com

### Enn einaferð stjørna

Danska blaðið BT skrivaði nú um dagarnar, at Danmarks Radio fer at hava ein nýggja kapping við Stjørnum í eitt kvøld, men at hesaferð verður kappingin broytt.

Ætlanin er, at kappingin í januar skal vera millum tey, sum eru kend frá undanfarnu kappingunum, og ein av teimum er sjálvandi Guðrun Sólja Jacobsen, vil BT verða við.

– Eg haldi, at tað kann verða spennandi at verða við aftur, samstundis sum eg kann heilsa upp á hinar luttakararnar aftur, sigur Guðrun Sólja við BT.

Sambært blaðnum skulu eisini James Sampson, postbðiði Kalle Brandt, læknin Thomas Stenberg, Jacob Andersen og Malene Mortensen verða við í kappingini.

### Føroyska framleiðsla

Natasja Crone heldur fram sum vertur fyri kappingini, og DR sigur, at hetta verður seinastu ferð, at Stjørna í eitt kvøld verður á skránni.

Tað verður framleiðslufelagið Blu, sum føroyski Per Zachariasen er annar av høvuðsmonnunum aftanfyri, sum kemur at framleiða nýggju kappingina.

# Gunnar vil ikki spæla við

**– Tað hevði verið eitt stig aftur fyri meg, um eg fór viðaftur í Stjørna í eitt kvøld, sigur Gunnar Mikkelsen, sum segði nei til at vera við, tá ið hann ikki slapp at spæla sín egna tónleik**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Gunnar Mikkelsen er ein av vinnarunum frá kendu sangkappingini Stjørna í eitt kvøld, sum Danmarks Radio skipar fyri. Men hann ætlar sær ikki at royna seg í kappingini aftur.

– Tá eg var við í kappingin av fyrstan tíð, var tað tí, at eg vildi vinna ein plátusáttmála, sleppa út at spæla og gera mín egna tónleik. Alt tað havi eg fingið burtur úr, og tí havi eg ikki hug at verða við aftur, sigur Gunnar Mikkelsen.

Hann er javnan úti og spælir, hann hevur givið fløgu út við sínum egna tónleiki, og hann fer at skriva nýggjar sangir saman við bólkinum hjá sær.

### Noktandi svar um egnan tónleik

– Hevði eg sloppið at spælt mín egna tónleik í kappingini, so hevði tað kanska verið eitt gott hugskot, men tað sleppi eg ikki, og so havi eg takkað nei, sigur hann.

– Eg havi lagt stóran dent á, at tað ræður um at spæla sín egna tónleik, og tí hevði tað verið forvirrandi fyri tey, sum lurta eftir mínum tónleiki, um eg aftur fór við í kappingina og fór at syngja kopisangir, heldur Gunnar Mikkelsen.

Komandi vikuskiftið skal hann spæla í Keypmannahavn og í Horsens.

## Vinnan setir ferðina niður

Innflutningurin av maskinum og aðrari útgerð til vinnuna er minkað við einum fjórðini í ár. Tað vísir ein uppgerð hjá Hagstovu Føroya.

Innflutningurin til Føroya fyrstu átta mánaðirnar í ár minkaði við 28 prosentum, og tað kemst serliga av, at innflutningurin av skipum er minkaður. Verða skipini tikin burtur úr, er minkingin trý prosent.

Tað er serliga innflutningurin av íløguvørum og vørum til vinnuliga nýtslu, sum er minkaður seinasta árið. Av maskinum og aðrari útgerð er innflutt fyri 77 miljónir minni í ár enn í fjør, ein minking upp á 24 %.

Og afturgongdin í alivinnuni sæst týðuliga aftur í innflutningsvirðinum á alifóðri, sum er farið úr 168 miljónum fyrstu átta mánaðirnar í 2003 niður á 105 miljónir í ár, ein minking upp á 37 %, vísir uppgerðin hjá Hagstovuni.

## Tey privatu halda fram

Innflutningurin av vørum til beileiðis nýtslu liggur í ár á sama stigi, sum hann gjørdi í fjør.

Meðan vinnan ikki klárar at halda ferðini, hava tey privatu ikki sett fótin á bremsuna, hóast afturgong í búskapinum.

Fyrstu átta mánaðirnar í ár er innflutingurin til privata nýtslu tann sami, sum hann var somu tíð í fjør.

Harafturat er innflutningurin av brennievni, bensini og tílíkum vørum er vaksin við 39 miljónum fyrstu átta mánaðirnar í ár í mun til sama tíðarskeið í fjør. Hetta er ein vøkstur upp á 13%.

## Útflutningurin minkar

Føroyski útflutningurin er minkaður í ár við 103 millíónum krónum. Tað er ein afturgongd á 4 prosent, vísir ein uppgerð hjá Hagstovu Føroya.

Av toski, hýsu og upsa er útflutt fyri slakar 95 miljónir ella 9 % minni. Í nøgd er talan um eina minking upp á 13 %. Av hesum fiskasløgum er tað serliga upsin, sum ger munin. Útflutningurin av upsa er farin niður við 26 % í nøgd og 28 % í virði.

Útflutningurin av laksi er minkaður góðar 33 miljónir ella 7 %, og av sílum er minkingin út við 68 miljónir ella 54 %.